# Ongin hevur patent upp á flaggið



**Flagdagsrøða hildin í Funningsfirði.**

FLAGGDAGSRØÐA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

At Elduvík og Funningsfjørður bjóða seg fram millum tey mongu plássini, sum skipa fyri flaggdagshaldi, vísir, at flaggið hevur djúpar røtur niður í minstu pláss í landinum. Eg eri takksamur fyri, at tit hava víst mær tann heiðurin at flyta nøkur orð fram í dag á flaggdegnum, tí hóast eg havi bú meginpartin av vaksna lívinum í stóðbýum úti í heimi og heima, so kenni eg meg framvegis sum ein bygdarmann, djúpt rótfestur í hesum vind og ísbardu fjøllum kring Funningsfjørð og aftanfyri tey liggur heimbygd mín Oyndarfjørður. Mín samleiki er her norðuri og tað er ikki dagur í lívinum, at mínir tankar ikki leita aftur til hesa stórfingnu náttúru, sum er tykkara heim og mín longsul.

Eg kenni meg sum ein part at hesum heimi og eg eri velduga stoltur av honum. Eri her ofta, kenni fólki og um ikki altíð upp á persón, so av familju og tað gongur ikki long tíð, so hava vit okkur til felags at tosa sum. Hetta er ein góður partur av Føroyum, við ríkari náttúru, og góðum fongi av sjógvi. Tit kunnu vera errin og eg eri errin av at verða ættaður higani.

Í dag er flaggdagur, dagurin, har vit minna okkum á, at vit ikki bara eru menniskju, men at vit eisini eru ein tjóð, eitt fólk og merkið er felagsmerkið fyri okkum øll. Tað merkir, at undir merkinum eru vit øll líka, vit eru føroyingar. Øll sum viðurkenna sær føroyska flaggið eru føroyingar, uttan mun til hvørja politiska áskoðan vit hava. Merkið er líka kært fyri tann argasta sambandsmannin, sum fyri tann mest ídna tjóðveldismannin og øvugt

Men hevur Merkið nú so stóran týdning í landinum. Um vit telja flaggstengur kring landið, so stendur kanska ikki so væl til. Men vit kenna fløvan av merkinum, tá vit síggja tað, tá vit eru umboðaði úti í heimi, ella tá onkur av okkara kæru er farin. Ella til brúdleyp og aðra høgtíð.

Og flaggið bleiktrar eisini í Funningsfirði, ikki bara flaggdagar, men aðrar dagar við. Fyrstu ferð eg sá føroyskt flagg í Funningsfirði var í eini grind fyri nú mongum árum síðan. Formannsbáturin bar flaggið og tað var virðing um hendan bát. Hesin bátur skuldi skipa soleiðis fyrr, at kærkomni fongurin ikki slapp.

Flaggið kann eisini vera vandamikið, ógvuliga vandamikið. Eitt politiskt høgrarák fer um vesturheimin í hesum døgum og fremst í hesum ráki stendur flaggið. Flaggið gerst vandamikið, tá vit knýta ávísan húðalit til flaggið, tá flaggið ikki er felagsnevnari fyri øll í samfelagnum, men bert ein bólk, sum heldur seg vera betri og meira enn hini.

Tá serbiska flaggið bleiktraði víða um á Balkan fyri nøkrum árum síðan, lógu hópdráp í slóðini á tí. Vit hoyra um hesi í rættarmálinum í altjóða dómstólinum í Haag í hesum døgum. Tá flaggið hjá Nazi-Týsklandi bleiktraði lógu hópdráp, sum vit valla kunnu ímynda okkum, í slóðini á tí.

Og hví so taka slík óhugnalig dømi upp ein várdag í friðaliga Funningsfirði, her ongantíð kríggj av týdningi hevur valdað, her fjørðurin hevur andað og givið lív í øldir.

Tí flaggið, so vakurt tað enn er, hevur stóra makt og kann misbrúkt elva til stóran skaða. Vit hava sæð nógv til tað seinastu árini, har samfelagið gongur í tveimum bólkum, antin loysin ella samband. Vit síggja eina polarisering í føroyska samfelagið, har skyldfólk valla tosa við hvønn annan, tí tey eru ósamd um okkara ríkisrættarligu støðu. Har politikkur setir split í heldur enn at savna. Valið týsdagin fer helst eisini av prógva hetta. Lat eitt verða sligið fast, ongin føroyingur, uttan mun til um hann kann vísa reina ættartalvu í øldir, ella er ættleiddur uttan úr heimi, kann siga, at hann er meira føroyingur enn nakar annar. Uttan mun til húðalit ella politiska sannføring, so kann ongin siga at hann er meira føroyingum enn nakar annar. Ongin kann siga at hann eigur meira av merkinum enn nakar annar.

Flaggið er ein partur av okkara samleika, av okkara identiteti og vit kenna tað sum okkara felags eyðkenni. Onkuntíð er langt í millum, at ein sær flaggið. Eg havi sjálvur verið útiseti eini 10 ár av mínum lívi. Tá eg sum blaðungur gekk á skúla í Danmark, hekk eitt stórt føroyskt flagg sum prýði inni á lítla kamarinum hjá mær. Tað var gamalt og slitið, men var so sjónligt og stórbært og tað minkaði um longsulin.

Tá eg ár seinni settist búgv í Singapore var merkið við. Tað stóð í stovuvindeyganum, sum eitt lítið borðflagg og vísti seg fyri slangum og øðrum vandamiklum djórum, sum livdu uttanfyri, beint í frumskóginum, sum var okkara nærmasti granni.

Og tá eg ár seinni aftur helt til í Hamborg, sá eg ein dagin føroyska flaggið bleiktrað afturi á reyv á stoltu skútuni Helenu hjá Hassa í Miðvági. Eg minnist, at hjarta hoppaði, so fegin gjørdist eg, tí árini frammanundan hevði eg vitjað umborð á hundraðtals skipum og ongantíð hevði eg sæð føroyska flaggið.

Merkið ber boð um eins egna samleika og tá tú ikki sær flaggið, so gerst tú góður við fløggini, sum standa nærmast tínum egna. Úti í stóra heimi sá eg dagliga danska flaggið Dannebrog og eg gleddist eisini við at síggja hetta.

Og í eitt nú Singapore vóru øll glað um flaggið, hóast tað neyvan finnst land í heiminum við meira blandaðum fólki, enn júst í hesum landi. Tú kundi síggja krunkasvartar indarar og og snjóhvítar kinesarar sita ernar og tosa um hvussu vakurt teirra flagg var og talan var um sama flagg. Flaggið er ein partur av samleikanum.

Tí eigur flaggið at vera tatoverað djúpt inni í hjørtum okkara, sum stemplið fyri at vit eru føroyingar, eitt gott fólk, ikki betur enn nakað annað fólk, men eitt gott fólk, sum ikki nýtist at skammast, líka mikið hvar tað ferðast í heiminum.

Og flaggið sum okkara samleikaeyðkenni hevur eisini annan týdning fyri føroyingar. Flaggið knýtir okkum saman við hinum brøðratjóðunum í Norðurlondum, sum eisini nýta krossin sum høvuðstekin í flagginum. Krossurin knýtir okkum til kristindómin og merkið sýnir, at vit eru ein kristin tjóð, sum byggir á kristnu lívsvirðini. Og tí kundu vit kanska oftari hugsa um flaggið, tá okkara egoisma skapar sundurlyndi og klandur millum okkum og okkara næstu. Hugsaðu vit um krossin í flagginum oftari enn sjálvan flaggdagin, so kanska vit klandraðust minni, og kanska vóru vit eitt sindur betri við hvønn annan.

Danska flaggið kom sendandi niður av himli fyri mongum hundrað árum síðan. Okkara sá dagsins ljós millum studentar fyri mongum árum síðan niðri á Garði í Keypmannahavn. Tað var ungdómurin tá sum á fyrsta sinni bar merkið fram. Seinni varð merkið málað á føroysku skipini, sum sigldu vandasjógv og nú ber ungdómurin aftur merkið í alskyns ítróttarstevnum her heima á landi og úti í heimi við. Vit vísa flagg í okkara fiskaútflutningi og nú sæst eisini føroyska flaggið innan oljuvinnu og altjóða flúgving. Vit vísa flagg á sendistovum kring heimin. Okkara skip vísa flagg í fremmandum londum. Hendan lítla fjarskotna tjóðin smæðist ikki burtur. Onnur hava kanska onga meining um okkum, men vit føroyingar halda, at vit eru eitt dugnaligt fólk, og at vit avgjørt ikki eru verri enn nakað annar.

Lat okkum tí vóna, at flaggið frameftir fer at knýta okkum landsmenn enn meira saman sum felags merki fyri funningsfjarðarmenn, eysturoyingar, tjóðveldismenn, sambandsmenn, kirkjumenn og brøður, suðuroyingar og norðoyingar, tystar og ótystar, ríkar og nætar, klapparar og sjeyndadagsadventistar, elduvíkingar og oyndfirðingar, funningsmenn og gjáarmenn ella stuttsagt okkum øll somul. Gud signi flaggið, Gud signi okkum øll somul.

Lesið
Sosialurin
-tað loysir seg



# ítróttur

Nr. 81 • mikudagur • 1. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Fyrsta slagið um Havnina í kvøld



*Rúni Nolsøe hevur góðar vónir undan dystinum. HB hevur havt undanvind í bólkaspælinum, har liðið ikki tapti nakran dyst*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

**Í kvøld, mikukvøldið, bresta havnarliðini HB og B36 saman í fjórðingsfinaluni í steypakappingini. HB-liðið er fullmannað, meðan B36 má klára seg uttan stríðsmannin á miðvøllinum, Klæmint Matras, sum hevur meitt sær fótin**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Tær báðar krígslegurnar í Gundadali fyrireika seg til fyrsta veruliga slagið í hesum kappingarárinum. Bólkaspælið er farið afturum bak, og liðini skulu nú royna seg í fjórðingsfinaluni.

Til henda dystin hevur HB hvørki skaðar ella leikbann at dragast við, og tað er nakað nýtt í hópinum hjá HB, sum var sera illa raktur av skaðum í fjør.

B36 hevur hinvegin ein spælara sitandi uttanfyri við skaða. Tað er Klæmint Matras, sum spælir á defensiva miðvøllinum hjá B36. Hann forstúvaði fótin í venjing fyri trimum vikum síðani, og hann er ikki sloppin av við skaðan enn. Tí má Piotr Krakowski finna ein annan leikara at røkja uppgávuna hjá Klæmint.

– Eingin ivi er um, at hetta er ein stórur smeitur fyri liðið og ein missur á miðvøllinum, sigur John Petersen, liðformaður hjá B36. Hann vísir tó á, at Klæmint ikki hevur verið við tveir teir seinastu dystirnar, og tí kann liðið venja seg við at spæla uttan Klæmint.

Jens Kristian Hansen hevur drigist við ein skaða seinastu tíðina, men hann er við aftur móti HB, og John Petersen er eisini komin fyri seg, hóast hann ikki vandi mánadagin undan dystinum.

### Vind eller forsvind

Eingin ivi er um, at ein sigur hevur alstóran týdning fyri bæði liðini mikukvøldið. Eitt er, at hetta er fjórðingsfinalan í steypakappingini, men hetta er samstundis ein grannauppgerð millum tveir argar fíggindar.

– Hesin dysturin skal bara vinnast. Tað er »vind eller forsvind«. Eingin ivi er um, at hetta verður ein harður dystur, sigur Rúni Nolsøe, liðformaður hjá HB. Og liðformaðurin hjá B36 er samdur.

– Hetta verður óivað ein tættur og intensur dystur, tí nógv stendur uppá spæl. Tað kann væl enda við eini brotssparkskapping, heldur John Petersen.

Hann vísir á, at B36 kanska hevur eitt lítið sálarligt yvirtak, tí tað B36 hevði gott tak á HB í fjør, men hinvegin ásannar John, at HB hevur verið sera væl spælandi í bólkaspælinum, har teir ikki taptu nakran dyst. Hjá B36 hevur gingið heldur striltið seinastu dystirnar, har teir hava tapt móti NSÍ, VB og so ÍA sunnudagin.

Rúni Nolsøe hevur góðar vónir til dystin, og hann heldur, at leikararnir hava lagt árið fjør afturum bak.

– Hetta er eitt nýtt kappingarár, og tað hevur gingið væl í steypakappingini, hóast spælið ofta kundi verið betri, men vit eru í góðari venjing upp til fjórðingsfinaluna, heldur Rúni Nolsøe.

Í kvøld skulu liðini so standa sína fyrstu veruligu styrkiroynd í hesum kappingarárinum. Ilt er at vísa á nakran favoritt undan dystinum, men um hugt verður at dagsforminum og úrslitunum í seinastu dystunum, so hevur HB kanska munin.



*John Petersen væntar ein tættan og intensan dyst í kvøld. B36 má klára seg uttan Klæmint Matras*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Ætlar tú at keypa
nýggjan bil
og
ongan brúktan
lata inn í býti? So ber til at gera
kvetti nú
Vit hava plásstrot vegna ov stórar goymslur av hesum modellum:
Mazda 626
Mazda Premacy
Mazda E2200 við trælast
Mazda E2200 innilokaður vørubilur
Mazda E2200 6 og 9 pers. Stationcar
Mazda B2500 RegCab, StrCab og DblCab, 4x2 og 4x4
Avsláttirnir eru frá
Kr. 20.000 og uppeftir
BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35
Klaksvík · Tel. 28 10 00